*Daniel Poulsen, serkønur í oljumálum:*

# Landsstýrið eigur at prioritera oljuvinnu nógv hægri




*Meðan alt er á gosi í Bretlandi og í altjóða oljuumhvørvi risastóru oljugoymslurnar, sum funnar eru millum Føroyar og Hetland, so hoyrist lítið og einki frá føroyskum myndugleikum. Hetta heldur Daniel Poulsen, oljuserfrøðingur er løgið. Hann skilir ikki, hví ikki føroyskir myndugleikar prioritera oljuspurningin hægri*

Daniel Poulsen, sum er støddur í Aberdeen í løtuni sigur, at Hetland og Skotland eru rættiliga í fokus millum allar tær stóru alheims oljufyritøkurnar í løtuni. Hann heldur sjálvur, at føroyingar nú eiga at lata við seg koma og vísa umheiminum, at vit eisini vísa møguleikunum at finna olju í føroysku undirgrundini ans.

-Eg haldi, at landsstýrið átti at prioriterað hetta málið nógv meira enn gjørt hevur verið. Eg veit væl, at tað nú verður bíðað eftir frágreiðingini frá nevndini, sum er sett at arbeiða við hesum, men ein kann eisini bíða seg í hel

Tað, sum hendir í løtuni, er einki minni enn ein kollvelting

Tey tíðindi, sum nú verða váttað um nógvu oljuna millum Heltand og Føroyar eru at sammeta við tá fyrstu uppdagingarnar vórðu gjørdar av olju í Norðsjónum heldur Daniel Poulsen.

Júst í hesi løtu er komið fram í Bretlandi, at stjórnin hevur avgjørt at flyta alla orkuumsitingina til Aberdeen, sum við hesum kemur at verða framtíðar orku- og oljumiðdepilin í øllum Europa.

Gitt verður, at ein av orsøkunum til hetta er nettup tær stóru oljugoymslurnar millum Hetland og Føroyar

Tað var annars stutt undan seinastu samráðingunum okkara við bretar um markið, at tað lak út, at bretar høvdu funnið stóra oljukeldu við føroyskað markið.

Bretski samráðingarleiðarin segði tá við Sosialin, at hesar oljukeldur taldu ikki so lítið í kravinum frá bretum at fáa størri part av økinum, sum føroyingar í dag ogna sær

Nú skulu so nýggjar samráðingar vera í London í næstu viku. Og nú komu so aftur stórtíðindi úr Bretlandi um oljukeldurnar við markið

Áhugavert verður at vita, hvat fer at spyrjast burtur úr samráðingunum

jan

*Nú verður tað váttað:*

# Risastór oljukelda við føroyska markið




**Bretska oljufelagið BP váttar nú gitingarnar, sum hava verið í seinastuni um, at fyritøkan hevur gjørt sera áhugaverdar uppdagingar stutt frá føroyska fiskimarkinum**

Daniel Poulsen, sum hevur verið ráðgevi hjá landsstýrinum í oljumálum sigur við Sosialin, at allar gitingar og metingar, sum hann og aðrir hava gjørt sær um umrøddu keldu, nú vísa seg at vera 100% rættar. Veruleikin er tann, at Føroyar liggja møguliga og svimja í olju uttan at vit geva okkum fær um hetta.

Men tað gera bretar og tað nógva virksemið í í bretska orkumálaráðnum og í oljubransjuni sum heild prógvar, at júst økið millum Hetland og Føroyar verður mett sum eitt tað mest áhugaverda fyri framtíðar oljuvinnu í kanska øllum Europa.

Bretar leggja so stóran týdning í keldurnar teir hava funnið í Hetlandsrennuni, at stjórnin heilt óvæntað hevur framskundað útbýting av lisensum við næstan einum hálvum ári. Tað eru tey bæði oljufeløgini BP og Shell, sum nú fáa loyvi at byrja vinnuliga boring í økinum.

Serkønir í oljuspurningum vilja vera við, at tíðindini um tær nýggju oljukeldurnar í Hetlandsrennuni, er eins stór tíðindi, sum tá menn funnu olju í Norðsjónum.

Ti talan er bert um nøkur fá borihol og longu nú ber til at siga, at her finnast risastórar oljugoymslur.

Tað er greitt, at hetta eisini hevur stóran áhuga fyri Føroyar, hetta at tað nú er staðfest, at olja finst í so stórum nøgdum við føroyska markið.

Sosialurin hevur roynt at fáa eina viðmerking frá løgmanni, sum umsitur undirgrundina, men hon var upptikin á fundi.

**Aðalfundur**

Arbeiðsmannafelagið Fylking heldur ársaðalfund í hølum felagsins
**mánadagin 22. mars kl. 20.00.**
Fundarskrá sambært grein 20 í lóg felagsins.

**Nevndin**


*JAPAN*
**HANDSKAR**
**ADC**
Heilsølan
*Láarvegur 14 - Tórshavn*
*Tlf. 15828 - Fax 15893*

**Sinnisbati**

**Frítíðarhølið í Krossgøtu 15 er opið miku-kvøld kl. 19–22.**